## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.







Fyri 30 árum síðan:

# Sjónleikir í 1976



*Kvívíkingar framførdu leikin "Spanska fluga". Á myndini eru, f.v.: Jógvan Nielsen, Ásmund Joensen, Óli Kurt Hansen, Lisa Dam, og Petur Müller*

Í 1976 vóru fleiri sjónleikir framførdir kring landið. Í Húsavík framførdu tey franska leikin "Kom ikki at málingini". Í Sjónleikarhúsinum í Havn framførdu tey leikin "Hvønn stakkin skal eg fara í, pápi" eftir Jens Paula Heinesen. Kvívíkingar framførdu leikin "Spanska fluga" av Franz Arnold og Ernst Bach, sum Axel Tórgarð og Janus Mohr høvdu umsett til føroyskt. Vágbingar framførdu leikin "Gift teg", sum var framførdur til frama fyri nýtt felagshús til Vágs Bóltfelag. Frammanundan hevði hesin leikur verið framførdur av eiðisfólkum.

Gøtu Menningarfelag stóð fyri skemtileikinum "Ættarlið", ið var skrivaður av Karl Thomsen. Hesin leikur fekk 3. plássí kapping Varðans í 1975.

Samanumtikið vóru allir leikirnir væl umtóktir og væl vitjaðir.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1976*

# Motorsúkklurnar størsta vøksturin

**Tølini hjá Akstovuni fyri søluna av nýggjum akførum, í tíðarskeiðnum januar februar 2006, vísa ein týðuligan vøkstur í søluni av persónbilum, vørubilum og motorsúkklum**

AKFØR

Í fjør vóru seldir 158 persónbilar í mun til 220 í ár - ein vøkstur upp á næstan 40 prosent.

Vørubilarnir høvdu ein vøkstur upp á yvir 90 prosent við 48 í mun til 25 í fjør.

Størsta vøkstrinum í prosentum standa motorsúkklurnar fyri, har vóru 21 seldar í mun til eina í fjør.

Tilsamans var vøksturin í søluni av nýggjum akførum teir fyrstu tveir mánaðirnar íár upp á 61 prosent við 130 fleiri seldum akførum í mun til í fjør.



*Motorsúkklurnar standa fyri størsta vøkstrinum í søluni av nýggjum akførum*




Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN - FEB 2006 og 2005

01-03-2006

| Akfaraslag | Feb 2006 | Feb 2005 | Broyting Feb 06/05 | Jan-Feb 2006 | Jan-Feb 2005 | broyting 06/05 | %broyting 06/05 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Bussar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Kampingvognur | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | 100,00% |
| Hýrubilar | 3 | 1 | 2 | 4 | 1 | 3 | 300,00% |
| Lastbilar | 1 | 1 | 0 | 2 | 1 | 1 | 100,00% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Líkvognur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Motorsúkkla | 10 | 0 | 10 | 21 | 1 | 20 | 2000,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Persónbilar | 125 | 84 | 41 | 220 | 158 | 62 | 39,24% |
| Prutl | 17 | 10 | 7 | 26 | 18 | 8 | 44,44% |
| Smábussar | 2 | 0 | 2 | 4 | 1 | 3 | 300,00% |
| Tangabilar | 0 | 1 | -1 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Viðfestivognar | 10 | 4 | 6 | 16 | 7 | 9 | 128,57% |
| Vøruvognar | 22 | 8 | 14 | 48 | 25 | 23 | 92,00% |
| Samlað | 191 | 109 | 82 | 343 | 213 | 130 | 61,03% |